

# Emil! – s

**Klaksvíkar Sjónleikarafelag kann bera høvdið høgt, og stoltir kunnu leikararnar vera. Vit onnur, sum hava sæð leikin, kunnu vera felagnum og tess leikarum takksom fyri hetta væla verk, skrivar Frits Johannesen í Fuglafirði**

UMMÆLI
*Frits Johannesen*

Emil, Emil! Hevur rungað eftir í í Mentanarhúsinum í fleiri kvøld. Ja, hetta var hugvekjandi at fáa Klaksvíkar Sjónleikarafelag inn um Helláir at sýna hendan tiltikna leikin. Hálvur salurin var ein installatión í reyðum og hvítum. So vorðin eru og vóru tey gomlu svensku træhúsini. Hóast vit hava alt ov nógvar svartar tekjur, sum tyngja bygdaløgini her heima, so eru tó onkur hús enn, sum bera brá av hesum liti, ið lýsa upp í landslagnum sum dreymsóljur.

Hesin livandi litur stóð sum ein ramma um sjónleikararnar og teirra dáðfýsna leik, nú Klaksvíkar Sjónleikarafelag hevði sett hendan leikin á pallin í Mentanarhúsinum. Reyða húsið í mittuni á Kattholti dróg mangt hjartað til sín og fekk løtur at renna fram um barnaskaldið Astrid Lindgren, sum hevur ríkað okkara lív um barnaverðina, sum vit øll kunnu kenna okkum aftur í bæði í hvítum og reyðum liti.

## »Sinnetaggen«

Ja, hesin ribbaldurin Emil leiddi tankarnar til Frognerparkina í Oslo, har Gustav Vigeland hevur tilevnað ein smádrong, sum vil flyta heimin – Sinnataggen, sum er heimskend standmynd. Drongurin er fúkandi óður. Við sínum knýttu nevum og trampandi føti, so rennur okkum til hugs, at tað hevur týdning at vísa, hvør ein er. Eitt óskyldugt barn hevur Vigeland brúkt til hesa útsøgn. Ja, sjálvt tey minstu og veikastu vilja geva seg til kennar í sínum dagligu viðurskiftum. Tú fært samkenslu við hesum ribbaldi, sum ikki letur seg vika hóast ábreiðslur og vegleiðingar frá teimum vaksnu.

Barnaverðin er abstrakt. Vit vaksnu oyðileggja børnini. Vit lata tey í ein borgarligan ham, sum er ringur at fara í. Dreymurin um barnaverðina livir í okkum alt lívið og fær okkum at venda aftur til hendan mista heimin, sum Atrid Lindgren hevur givið okkum aftur í skaldskapi og Gustav Vigeland á ein annan hátt, hóast Sinnataggen og Emil ikki líkjast beinleiðis, so er nakað yvir teimum, sum vit ikki fara at gloyma í bræði, tá ið vit hava sæð og hoyrt hesar knorlar. Tað er tað óspiltað, barnsliga – at verða einsamøll ella einsamallur og royna at finna út av lívinum á ein barnsligan hátt og ikki finna seg til rættis í hesum rangvørga heimi. Tey vaksnu hava eisini trupulleikar alt lívið í hesari ónatúrliga, sjálvgjørdu verð, har tey á ymsum breytum royna seg dagliga fyri at klára seg í tí "vaksna" heiminum, og gongur tað kanska ikki altíð eftir vild. Tað er naskt og beinleiðis frekt at taka barnaverðina frá børnunum, og leiða tey inn í ein fallkomnan heim. Hetta er eitt skrýggj..... EMIL!!!!!

Hvar er drongurin? Kanska er hann inni í skúrinum ímillum sínar skurðmyndir, ið avmynda syndirnar, hann hevur gjørt. Ein mynd fyri hvørt skálkabragdið. Mamman skrivar í dagbókina, um neisirnar hann á Kattholti hevur vunnið teimum, sum standa honum næst . Hann telgir sær eitt ótal av "skurðguðum", sum verða hansara dagbók, um farnar, syndafullar dagar.

## Súpanarbollin

Ein dag fær hann ein súpanarbolla yvir høvdið, og nú sær hann ikki fram um nøsina, men má leiðast til læknan fyri at fáa "sjónina" aftur. Alt hansara dreingjalív er ein opinbering - ein kosmisk, óendaliga hvørvisjón, sum er undir einum súpanarbolla. Har stendur ólukkudýrið undir einari stavnhettu úr glasi, einum gekkaskorti, sum rúmar øllum. Øllum teimum, sum eru við í leikinum, tær og mær, sum eru áskoðarar. Hetta var eitt óhapp, at hann fekk bollan niður yvir høvdið. Tað var hansara ósketni, hansara dreingjalív við ongum fyriliti, sum tók okkum undir hetta glaruta holdið. At vera eina æviga skamma stund í einum hylki, gera vit dagliga á ymsan hátt. Vit flýggja hvør á sín hátt og fjala okkum undir onkrum, sum er okkara, kanska hava vit tað í kjøtinum borið at vera fjalin, kanska eitt sindur mannarædd og liva lívið einsamøll undir einum skjóli, onkuntíð saman við øðrum í einum bindiklubba, sangkóri, samkomu, familju, seyðahaldi, ítróttrafelga, á eini útoyggj o. s. fr, men al oftast eru vit einsamøll. Tað trýtur ikki av tílikum hugtøkum, har tú ert í tínum kjøtliga líki undir lívsins skiftandi korum , og øll hava vit sín skúr at leita til. Seta okkum niðurá , telgja avguðar á ymsan hátt og gyklast mangt og mikið fyri okkum í einari tilevning av einari skurðmynd í einum skúri.

Michael Kvium (danskur listamaður, føddur í Horsens 1955), hevur onkuntíð málað heilarnar uttan á høvdinum á fólki. Ja, er tað ikki løgið, at vit dag og dagliga ganga við hesum sperdu heilakyknunum og royna at fáa javnvág í? Hann hevur rakt okkum í hesari realistisku myndagerð við heilanum. Vit síggja hendan greytin. Hetta er eins og ein glarutur bolli, sum er okkara og lítið skal til, fyri at fáa oyðilagt hendan vavgreyt av livandi tæðrum undir skallanum. Ein dag, so fer alt hetta tilfar í grús, og tá er bara ein dómur eftir... Doyr fæ, doyggja frændur, doyggi eg sjálvur samur; eitt eg veit sum aldri doyr, dómur um deyðan mann. Stravið hevur Emil tað fyri at koma inn í tann vaksna heilagjørda heimin, og stravið høvdu flest okkara tað at røkka gáttina til hesa tilgjørdu verð.

Og so er at fara millum hesi sker fyri at leggja barnalandið aftur um seg. Tað er ein gangur kring hendan ribbald, sum vil broyta heimin, so hann og Ida kunnu fáa eina øðrvísi verð... og galið gongur tað altíð. Sjálvandi! Kanska er Emil ein Sinnatagge, sum trampar øðrvísi enn pinkulingurin hjá Vigeland, men hann trampar, so tað gellur eftirí.

## Ribbaldur, knorlur

Tað hendi ikki bara ta einu ferðina, at Emil fekk súpanarbollan niður yvir seg, men heilar tvær ferðir. Emil er grammur, og skuldi hava tað síðsta av súpanini úr bollanum. Sjaldan er berskakin bestur. Áfast varð millum hann og bollan. Fyrru ferð fór hesin fitti ótangi til lækna saman við foreldrunum at fáa hann avaftur, men í sínum kurtesi brast bollin í borðið, tá ið Emil neig djúpt fyri læknanum. Ja, so einfalt var hetta at fáa hendan glaruta, høvuðhvíta hamin av sær aftur. Bollin rakti borðið , og hann fór í tveir partar. Seinnu ferð skuldi hann vísa Idu, systrini, hvussu